LØGTINGIÐ

Sirið Stenberg, landsstýrismaður í heilsumálum
Eiragarður 2
FO-100 Tórshavn

Fíggjarnevndin

**19. juni 2018**
**j. nr.**
(at tilskila í svari)

Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum hevur við fíggjarnevndarskjali, dagf. 7. juni 2018, søkt Fíggjarnevndina um at hækka játtanina til høvuðskontu 11.20.3.04. Landssjúkrahúsið (*Rakstrarjáttan*) við kr. 10 mió.

Fíggjarnevndin hevur á fundi 19. juni 2018 viðgjørt fíggjarnevndarskjalið.

Ein samd nevnd avgjørdi at játta kr. 7 mió. til gjald av eykarokning vv. uttanlandsviðgerðum, tí tað var tað, sum nevndin var samd um leyk treytirnar fyri fíggjarnevndarskjøl.

Annars helt nevndin, at landsstýrismaðurin eigur at leggja fyri Løgtingið á Ólavsøku uppskot til eykajáttan fyri at tryggja viðgerðarstøðið í heilsuverkinum.

N.v.

Høgni Joensen
nevndarskrivari

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901
LOGTING.FO